## Útsetir ferð til Ísraels



Svenska uttanríkisráðið kunngjørdi í gjár, at Carl Bildt, uttanríkisráðharri, hevur útsett eina ætlaða ferð til Ísraels. Einki varð sagt um orsøkina, men politiskir eygleiðarar í Stockholm ivast ikki í, at avgerðin hevur samband við eina grein í Aftonbladet, har tað stóð, at ísraelskir hermenn hava stolið og selt likamslutir av deyðum palestinum. Ísraelsku myndugleikarnir hava váttað, at ferðin hjá Bildt er útsett, men teir siga einki um orsøkina. Svenska stjórnin er biðin um at fordøma greinina í Aftonbladet, men stjórnin sigur nei og vísir til tali- og skrivifrælsið.

## Danskur yvirgangsmaður

Myndugleikarnir í Kenya siga nú, at ein yvirgangsbólkur hevði lagt ætlanir um eina atsókn at einum máli í Nairobi, tá amerikanski uttanríkisráðharrin, Hillary Clinton, var har og vitjaði í síðsta mánaði. Atsóknin varð av ongum, tí kenyanskir trygdarserfrøðingar fingu frænir av, hvat var á vási. Tað eydnaðist trygdartænastuni at avdúka bólkin, og teir fimm menninir í bólkinum vórðu tiknir. Sambært danska kringvarpinum DR hava myndugleikarnir í Kenya nú boðað donsku myndugleikunum frá, at ein av teimum fimm monnunum hevur danskt pass.



*Páll á Reynatúgvu hevur lagt kongin í morgun, tí hann vil ikki hava, at hann, hansara familja og Sands bygd skal standa modell til tað, sum fer fram*

# Páll á Reynatúgvu orkar ikki meiri

**Í morgun boðaði hann frá, at hann leggur frá sær sum borgarstjóri á Sandi**

SANDS BYGDARRÁÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Um tvær vikur er Páll á Reynatúgvu ikki borgarstjóri á Sandi longur.

Í morgun hevur hann nevniliga boðað frá, at á næsta bygdaráðsfundi á Sandi síðst í mánaðinum, fer hann at leggja frá sær sum borgarstjóri.

Tað hevur hann gjørt eftir áhaldandi atfinningar frá øðrum bygdaráðslimum ímóti hansara embætisførslu.

Atfinningarnar ímóti honum komu í hæddina í farnu viku, tá ið fýra av teimum sjey bygdaráðslimunum á Sandi beinleiðis heittu á hann um at leggja frá sær.

Teir fýra bygdaráðslimirnir vóru Brandur Sandoy, sum varð valdur á sama lista, sum Páll á Reynatúgvu og teir tríggir býráðslimirnir á hinum listanum.

Teir hava lagt dent á, at atfinningarnar ímóti Páll á Reynatúvu eru einans politiskar og ikki persónligar

Í eini grein aðrastaðni í blaðnum í dag nevnir Brandur Sandoy nakrar av orsøkunum til, at teir vilja hava Páll á Reynatúgvu frá.

Í høvuðsheitunum snýr tað seg um, at teir halda, at Páll á Reynatúgvu hevur hevur verið ógegnigur í fleiri málum.

Men tað snýr seg eisini um, at Sands kommuna skyldar Meginskúlanum so nógvan pening, at tað er við at verða ein álvarsligur trupulleiki, bæði hjá kommununi og hjá skúlanum.

### Leggur kongin

Í eini viðmerking aðrastaðni í blaðnum sigur Páll á Reynatúgvu sjálvur, at hann hevur gjørt av at leggja frá sær eftir at hava tosað við familjuna.

Hann staðfestir, at hann kennir seg ósekan í ákærum ímóti honum, men hann kann ikki liva við at familjan ferð aftaná ferð verður drigin gjøgnum fjølmiðlakvørnina saman við mínum politiska persóni.

Vit orka snøgt sagt ikki meira, sigur Páll á Reynatúgvu.

Annars hevur hann ongar viðmerkingar afturat tí, hann hevur skrivað aðrastaðni í blaðnum.

### Onga viðmerking

Sjálvur mælir hann til, at Olga Fossdalsá verður vald til borgarstjóra á Sandi. Hon er vald á sama lista sum fráfarandi borgarstjórin og hann heldur, at tað hevði speglað álit veljarans á listan.

Sjálv hevur hon onga viðmerking. Hon sigur, at hetta er alt samalt so spildurnýtt, at hon hevur als ikki havt stundir at hugsa um støðuna.

Yvirhøvur eru sandoyingar fáorðaðir í morgun.

Eyðvarur Petersen, sum er ein av teimum fýra, sum vil hava Páll á Reynatúgvu frá, sigur, at sum støðan er, var hetta tað frægasta, sum kundi henda, at borgarstjórin legði frá sær.

Men hann leggur framvegis áherðslu á, at talan er eina og aleina av politiskum orsøkum og ikki av persónligum.

Hann tekur eisini undir við grundgevingunum í greinini hjá Brandi Sandoy.

Men hvør skal vera eftirmaður Páll, er alt ov tíðliga at siga nakað um enn.

Tað sama sigur Fríði Nólsoy, sum eisini er ein av teimum, sum vildi hava Páll á Reynatúgvu at leggja frá sær.

- Hetta var tað, vit vildi hava hann at gera, men nú er hetta so nýtt, at eg havi ikki fleiri viðmerkingar enn, sigur hann.

# Hevur longu fingið 33 klagur

**Hóast Brúkaraumboðið akkurát er farin til verka, hevur hann longu havt úr at gera, varð sagt á almennari móttøku fríggjadagin, í sambandi við, at brúkarastovnurin er farin til verka**

BRÚKARAUMBOÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Brúkaraumboðið hevur longu prógvað sín tilverurætt.

Tað heldur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum.

Fríggjadagin var almenn móttøka í Vági í sambandi við at Brúkaraumboðið er farið til verka.

Á móttøkuni vísti Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum á, at stovnurin hann hevur longu prógvað sín tilverurætt.

Hóast Brúkaraumboðið bara hevur arbeitt í summar, hevur hann longu fingið 33 ítøkiligar klagur frá brúkarum, sum ikki føla, at handlar og fyritøkur eru farnar rætt fram ímóti teimum.

Av hesum málum hevur hann avgreitt tey 15 málini, men hini 18 eru enn undir viðgerð.

Umframt klagurnar, hevur hann eisini fingið einar 220 fyrispurningar umvegis telefon um ymisk viðurskifti.

Johan Dahl helt, at Brúkaraumboðið hevur fingið so góða undirtøku, at vit í longdini kanska eiga umhugsa at víðka stovnin til eisini at umfata eitt brúkarastýri, sum skal hjálpa og vegleiða brúkaran.

Á móttøkuni fríggjadagin trýsti Johan Dahl eisini á knøttin, sum startaði nýggju heimasíðuna hjá Brúkaraumboðnum.

Heimasíðan eitur www.bruk.fo og har er ymiskt at lesa um Brúkaraumboðið og niðast á heimasíðuni er eisini ein teigur, har tað ber til at senda umboðnum klagu beinleiðis við internetinum.



*Johan Dahl, landsstýrismaður trýstir á knøttin, sum startaði nýggju heimasíðuna hjá Brúkaraumboðnum ímeðan Brúkaraumboðið, Andrass Holm Arge, hyggur at*
*Mynd: Dagfinn Olsen*